Fíggjarmálaráðið

Dagfesting:	30.09.2025
Mál nr.:	24/22544
Málsviðgjørt:	DH, JEK
Ummælistíð:	N/A
Eftirkannað:	18.09.2025

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingarlógin)
(Hækking av barnafrádráttinum – fylgilógaruppskot til FLU 2026)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti (Ásetingarlógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 71 frá 30. apríl 2025, verður í § 2, stk. 1, 1. pkt. "kr. 9.200" broytt til: "kr.10.700" og "kr. 6.500" broytt til: "kr. 7.500".

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2026.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Landsstýrið vil gera tað meira liviligt hjá barnafamiljum. Uppskotið hækkar barnafrádráttin fyri hvørt barnið við ávikavist 1.500 kr. og 1.000 kr.

1.2. Galdandi lóggáva
Landið letur í dag ein frádrátt í landsskattinum fyri hvørt barnið. Fyri børn 0-6 ár er frádrátturin 9.200 krónur og fyri børn 7-17 ár er frádrátturin 6.500 kr.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at lætta um gerandisdagin hjá barnafamiljum.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Uppskotið hækkar barnafrádráttin við ávikavist 1.000 krónur og 1.500 krónur fyri hvørt barnið. Ein familja við trimum børnum fær sostatt millum 3.000 og 4.500 krónur meira útgoldið um árið.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið hevur ikki verið til ummælis.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri landið.

Á leið 13.000 børn eru í Føroyum. 5.000 eru millum 0 og 6 ár og 8.000 eru millum 7 og 17 ár.

Kostnaðurin av at hækka barnafrádráttin er 15,5 mió.kr. um árið, og hetta lógaruppskot er fylgilógaruppskot til fíggjarlógaruppskotið fyri 2026.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri vinnuna

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur jaligar búskaparligar avleiðingar fyri barnafamiljurnar.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið hevur ongar avleiðingar á millumtjóðasáttmálar.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið hevur ongar avleiðingar á tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

2.9. Markaforðingar
Uppskotið hevur ikki við sær markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið ásetir onga revsing, sektir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Talan er um eitt skattauppskot.

2.12. Gjøld
Uppskotið ásetir eingi gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Uppskotið áleggur ongum nakrar skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Uppskotið leggur ikki heimildir til landsstýriskvinnuna, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleika atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Uppskotið hevur ikki við sær aðrar avleiðingar.

2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Ja	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Við uppskotinum hækkar barnafrádrátturin ávikavist 1.500 kr. og 1.000 kr. fyri hvørt barnið treytað av, hvussu gamalt barnið er.

Barnafrádrátturin fyri børn 0-6 ár fer úr 9.200 kr. upp í 10.700 kr. Fyri børn 7-17 ár hækkar frádrátturin úr 6.500 kr. upp í 7.500 kr.

Til § 2
Áseting um gildiskomu.

Fíggjarmálaráðið, 30. september 2025

Ruth Vang
landsstýriskvinna

/ Bjarni Askham Bjarnason

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur